# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Síggja trøll á alljósum degi

Talan er eftir øllum at døma um stóra misskiljing, nú formaðurin í Tjóðveldi er farin í orðadrátt við føroysku peningastovnarnar um part av kapitalvinningsskattalógini. Hetta við teirri grundgeving, at loyvið til privatpersónar at draga rentur og møguligt tap frá í kapitalvinningi hevur virkað til, at fleiri privatir íleggjarar hava lænt seg út á sjógv.

Broytingarnar, sum vórðu framdar í kapitalvinningsskattalógini fyri trimum árum síðani, høvdu sum fremsta endamál at javnseta allar juridiskar persónar, tá talan var um tap og vinning av íløgum. Við øðrum orðum at burturbeina tann munin, sum fyri hetta varð gjørdur á partafeløgum og privatpersónum.

Vil Tjóðveldi aftur í eina støðu, har bæði privatpersónar og feløg skulu skattast av vinningi, men har bert feløg kunnu draga eina møguliga útreiðslu ella eitt møguligt tap frá, so er at siga hetta við reinum orðum, heldur enn at grugga málið við leysum pástandum.

Um tað hinvegin er so, at fólk hava lænt seg út á sjógv við óhepnum íløgum, so er hetta ikki eitt mál, sum hevur við kapitalvinningsskattalógina at gera. Tá hevur talan verið um ein óforsvarligan útlánspolitikk og vánaliga íløguráðgeving. Enn eru ikki ábendingar um, at so hevur verið, men er hetta støðan, hava vit ein heilt annan og nógv álvarsligari trupulleika við ábyrgdarkensluni hjá føroysku peningastovnunum.

**Sosialurin**

## Punktum finale

HERI MOHR



Nærum 36 ár sum tænastumaður á Føroya Gjaldstovu – tey seinastu árini stjóri – gjørdu lívið spennandi, engasjerað, stuttligt.

Av ávísum orsøkum, sum tóku støðið undan tí stuttliga, bað eg løgmann um at verða loystur úr embætinum nakað fyri pensiónsaldur.

Men sálin var treiskari. Hon legði ikki frá sær. Rýmdi ikki úr samfelagnum. Væl vitandi, at orðini skuldu vandast - ávís tagnarkylda lá á henni - vendi eg mær til fólk við drúgvum og nógvum lesarabrøvum, næstan øll við tí endamáli at upplýsa fólk um ríkiskassans blokkstuðul til okkara almenna húsarhald: almannaverkið, heilsuverkið og skúlaverkið.

Hetta kendi eg sum mína skyldu, tí at sterkar, politiskar kreftir villleiddu – og villeiða framvegis - alt Føroya fólk við ósannindum og eyðmýkingum um, hvat blokkurin í roynd og veru var og er ætlaður til. Eg havi eftir førimuni roynt at greitt frá søguliga og lógrættarliga støðinum undir blokkinum, og hvussu óprofessionelt og mannminkandi hann hevur verið handfarin síðan 1. januar 2002.

Eg havi skrivað so skiftandi, nuanserað, at onkursvegna skuldi eydnast mær at fáa almennan dialog við politikarar og onnur ábyrgdarfólk almennari fyrisiting viðvíkjandi. Men so eiðasørt. Sum at sláa í eina dýnu. Tað kvetti ikki úr einum einasta einum.

Kann slíkt veruliga henda í framkomnum demokratium?

Í hesum døgum frætta vit, at tann høgi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum er í so ringum standi, at hann her og nú má umvælast fyri 27 milliónir krónur, um hann ikki skal kondemnerast.

Hetta er tíverri ikki eindømi um órøkt av almennum ognum. Dømini eru mong.

Ætlanin var at gevast við skrivingini um blokkstuðulin, men lat hetta so vera punktum finale:

Fyrisitingarliga og roknskaparliga umsitingin av ríkiskassans blokki til landskassan er frá fyrsta degi í 1988 til dags dato óprofessionel við óheppnum avleiðingum. Í blokkinum eru upphæddir oyramerktar til rakstur og íløgur. **Íløgur** til sjúkrahúsverkið, ellis- og røktarheim, serforsorg og ymiska skúlabygging, samanlagdar umleið 19,2 milliónir árliga. Saman við restini av blokkinum fóru og fara upphæddirnar til íløgur í ”stóra pott”. Við øðrum orðum: hesin peningur varð ikki burturlagdur (goymdur) fyri at verða tøkur til tær skrásettu íløgurnar. Ein politisk avgerð?



Hesi árligu gjøld – ríkiskassans partur til bygging og umvæling av almennum ognum – eru í meðal dagførd við 1,5 % um árið, so tað er ikki trupult at rokna út, hvussu nógv ríkiskassin hevur goldið til **íløgur** í árunum 1988-2008. Her er talan um einar 300 til 400 milliónir krónur, sum ikki eru skrásettar í landskassans roknskapi.

Tá ið okkara trý sjúkrahús í stóran mun vórðu um- og útbygd í 1960-unum og 1970-unum, varð fíggingin avgreidd soleiðis: Fyrst legði ríkiskassin út allan byggikostnaðin, og so við og við varð helvtin (50%) av byggikostnaðinum umskipað til 25-ára lán (og styttri) úr ríkiskassanum. Hendan gjaldskipan var í samsvari við lógina um, at ríkiskassin og landskassin rinda hvør sína helvt av útreiðslunum viðvíkjandi sjúkrahúsunum í Føroyum. Og hendan lógin er framvegis í gildi.

Har ein skriðan er lopin…Í 2001 varð ”rótføroysk” avgerð tikin: Skerjið og niðurfrystið blokkin. Hesa ferð fór einki millum skins og hold. Nei, nú vórðu ótaldar milliónir av almennum peningi tveittar á bláman, og tað, sum ikki fór á bláman, fekk eina comatilveru í permafrosti.

Hetta varð framt av einum landsstýri í politiskum rúsi við spildurnýggjum Sjálvstýrismálaráðharra og Oljumálaráðharra við øllum tí, sum slíkir kosta, og við góðkenning frá einum meiriluta á Føroya Løgtingi. Av hesum rúsi er peninganeyð vorðin ein veruleiki, sum pikkar upp á dyrnar hjá Almannaráðnum og Heilsumálaráðnum og, sum vituligt er, eisini aðra staðni í landsins húsarhaldi, eitt nú á skúlaøkinum.

Í árunum 1999 til 2003 brúktu Sjálvstýrismálaráðið (frá 2003 alias Løgmálaráðið) og Oljumálaráðið 168 milliónir av skattaborgaranna peningi. 1. januar 2004 hvurvu hesi bæði ráðini eins og sápubløðrur. Men hesi árini gjørdist nationalisman ein dýrur kleppur fyri tað føroyska fólkið: Tvey ráð fyri 168 milliónir og síðan 1. januar 2002 árlig burturbeining av 366 milliónum úr blokkinum. Fyri hesar risaupphæddir – 168 mió. + 7 ferðir 366 mió. – kundu vit nú í dag átt ein nýggjan studentaskula v. m., Føroya Mentanarhús til sjónleik, tónleik (Symfoniorkestur) og sang, nýggj berghol á Borðoynni og millum Trongisvág og Hvalba og heilsuverkið og almannaverkið í forsvarligari fíggjarlegu.

Í landskassans bókhaldi var ein konto, sum æt ”Útreiðslur viðvíkjandi Ríkishospitalinum”, fíggjað 100% úr ríkiskassanum (í blokkinum). Heitið á kontoini varð strikað og broytt til ”Serviðgerð uttanlands”, so skjótt og brátt tað nationalistiska landsstýrið kom í 1998, men fíggingin til Ríkishospitalið er framhaldandi í blokkinum – men í coma. Barnsligar fjákalótir, og lítil er barnsins uggi, má sigast.

Loksins takki øllum teimum, sum hava víst forstáilsi, givið mær herðaklapp, fyri tað, ið eg havi skrivað um viðurskifti, sum eru týdningarmikil serliga fyri sjúk, gomul og tey, ið krevja hjálp og umsorgan, tí tað eru júst teirra milliónir, okkara politikarar hava fingið í coma og bundið í permafrosti.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.